Prestagarður Hammershaimbs settur í stand

Í morgin letur upp eitt bygdasavn á Nesi, í Eysturoynni. Tað er Fornminnisfelagið, ið eigur og rekur savnið, sum heldur til í prestagarðinum, sum Hammershaimb, prestur, lat byggja. Hóast garðurin sjálvur kanska er tað forvitnisligasta, so eru hópin av øðrum spennandi fornlutum eisini

BYGDASAVN
Eydna Skaale
eydna@sosialurin.fo

Jógvan Ingvard Olsen heldur røðu, tá ið savnið lat upp fyri innbodnum í síðstu viku. Týsdagin letur tað upp fyri almenninginum

Mynd: Maria Olsen

Jógvan á Lakjuni var millum tey innbodnu, og hann tók av møguleikanum at síggja forvitnisliga prestagarðin

Mynd: Maria Olsen

– Fornminnisfelagið her norðuri varð stovnað í 1995. Vit hildu til í gamla prestagarðinum, sum Landsstýrið átti. Men tá vit stovnaðu Bygdasavnið, keyptu vit gamla garðin frá Landsstýrinum. Hetta var í 1998. Síðani tað hava vit vælt um, fyrst uttan og síðani innan, og nú er hann klárur at lata upp fyri almenninginum, sigur Jógvan Ingvard Olsen, sum er formaður í felagnum.

Hann sigur, at garðurin var illa farin, tí hann hevur staðið tómur síðani 1976, og har hevði verið ein stórur vatnskaði eisini, so tað hevur verið eitt stórt arbeiði, at fáa hann í stand.

– Táið Hammershaimb bygdi garðin, var hann næststørsta húsið í landinum. Bara Amtmansborgin var størri. Hann var sum ein og hvør annar bóndagarður um tað tíðina. Vit hava funnið skjølini sum prógva tað, og hava tey her á savninum, so tað er nokk so stuttligt, sigur Jógvan Ingvard. –Vit hava roynt at fáa garðin at líkjast so nógv upprunaliga garðinum, sum gjørligt. Men sjálvandi er okkurt skift út síðani Hammershaimb var her. Tapet og plátur eru skift, men nú er garðurin, sum hann var í umleið 1930-50, sigur Jógvan Ingvard.

Áhugaverdir lutir

Men tað er ikki bert garðurin sjálvur, sum er áhugaverdur. Bygdasavnið hevur nevniliga fingið hendur á nógvum gomlum lutum. M.a. eru gomul arbeiðsamboð, ting frá krígnum, og nógv skjøl. Ein gomul toyrulla er eisini, sum kona Hammershaimb teknaði og Hammershaimb sjálvur bygdi. Bygdasavnið hevur somuleiðis fingið hendur á skjølunum, sum váttað lánið, sum Hammershaimb tók frá jomfu Schrøder, fyri at figgja toyrulluna. Tilfarið kostaði í 1863 4072 ríkisdálar. Hammershaimb skuldi gjalda lánið aftur innan 28 ár, og við 6% í rentu.

Bygdasavnið hevur eisini nógvar gamlar bøkur. Prestagarðurin hevur altíð virkað sum bókasavn, og nakrar av gomlu bókunum stava frá 1836. Í samband við hetta, er ætlanin, at prestarnir í Eysturoynni skulu taka bókasavnstáttin upp aftur, og hava teologiskt bókasavn á gamla garðinum. Jógvan Ingvard sigur, at savnið longu hevur fingið nógvar bøkur frá Jóhan Weihe og Jákupi Magnussen, prestum. – So kunnu prestarnir hava eitt stórt felags bókasavn her, júst sum í gomlum døgum, sigur Jógvan Ingvard. So kunnu teir koma higar at sláa upp og annað, sigur hann.

Lata upp týsdagin

Fornminnisfelagið hevur eini 90 limir og 5 nevndarlimir, sum allir hava hjálpt væl til í arbeiðinum við at seta húsini í stand. Jógvan Ingvard sigur, at eisini virkir og fólk annars hava sýnt tiltakinum áhuga, og hava hjálpt sera væl til. Hann nevnir, at herfyri, tá lutaseðlasøla og tombola var, komu uml 100.000 kr inn. Tað hevði ikki latið seg gjørt uttan nógva sjálvbodna arbeiðið og stuðulin tey fingu. – Hetta hevur ikki verið heilt bíligt, tí húsini eru jú so stór. Men nú er liðugt, og í týsdagin lata vit upp á fyrsta sinni. Ætlanin er at hava opið týsdagar kl 16-19 og sunnudagar kl 15-18 hetta til 1. September. Eftir tað, verður opið eftir avtalu, sigur Jógvan Ingvard.

Gamli prestagarðurin, sum nú er vorðin bygdasavn, stendur tætt við Sjógvin á Neshamri. – Tætt við gomlu kirkjuna, um onkur ivast, leggur Jógvan Ingvard afturat.

Umframt gamla prestagarðin, eigur Bygdasavnið eisini tvey onnur hús. Annað stendur á Toftum og hitt á Nesi.

Fólkatónleikarastevnan 2004

Mikudagin 14. juli, verður skjøtul settur á árligu Fólkatónleikarastevnuna. Tað er Føroya Fólkatónleikarafelag, ið skipar fyri og konsertirnar verða, eins og undanfarin ár, ymsastaðni kring landið. Í Havn, Runavík, á Kirkju, í Syðrugøtu og í Mykinesi. Eisini verður stevnan partur av G!-festivalinum

Tónleikarar:

Gemma og Isobel:
Í ár verða tveir forvitnisligir útlendskir gestir við á stevnuni. Hetta eru Gemma Donald, sum spælir violin og Isobel, sum spælir klaver. Tær koma úr Hetlandi.

Gemma er 15 ára gomul, men hevur hóast unga aldurin longu vunnið fleiri heiðursmerki innan tónleikin, m.a. varð hon skýrd at vera Young Fiddler of the Year, fyri nøkrum árum síðani. Fyrr í ár var hon við í eini fiólkapping í Skotlandi, har hon megnaði at vinna fýra heiðursmerki og at fáa fleiri stig enn nakar annar violleikari hevur megnað síðani kappingin byrjaði í 1959. Tær báðar fara fyrst og fremst at spæla við Spælimonnunum, men eisini fara tær at framføra sum duo.

Tær framføra sum duo 15. juli kl 20.30 á Kirkju, 17. juli kl 13 í Runavík og 18. juli kl 16 í Norðurlandahúsinum.

Heðin Ziska Davidsen trio:
Síðani verður ein nýggj trio við Heðini Ziska Davidsen, formanni í Mentón, á odda. Umframt Heðin verða Mikael Blak og Høgni Lisberg við. Teir spæla jazzut instrumentalt tilfar hjá Heðini. Fyrireikararnir siga, at hesin tónleikurin minnir um tónleikin á útgávuni Tjant.

Teir verða at hoyra 14. juli kl 20.30 í Runavík og í Norðurlandahúsinum 18. juli kl 16.00

Spælimenninir:
Spælimenninir eru eisini við í ár. Við í Spælimonnunum eru Kristian Blak, Sharon Weiss, Ívar Bærentsen, Hilmar Joensen, Angelika Nielsen, Daniel Nielsen, Rebekka Blak, Jákup Lützen og Heini Lützen. Somuleiðis verða hetlendsku Gemma og Isobel við spælimonnunum. Tey fara at spæla hetlendskan, norðurlendskan og amerikanskan spælimanstónleik.

Spælimenninir framføra 14. juli kl 21.00 í Vertshúsinum, 15. juli kl 20.30 á Kirkju, 16. juli kl 19.00 í Syðrugøtu, 17. juli kl 22.00 í Hafnia Lounge og 19. juli í Mykinesi.

Markamót:
Bólkurin er mannaður av royndum tónleikarum. Eyðun Hansen, Finnur Hansen, Janus Trúgvason og Arnhold Ludvig spæla við. Teir spæla egnan instrumentalan tónleik og vísur á føroyskum.

Markamót verður at hoyra 18. juli kl 16.00 í Norðurlandahúsinum og 19. juli í Mykinesi.

Enekk:
Kári Sverrison og Agnar Lamhauge spæla nýggj og eldri løg, flestu teirra hjá bólkinum Enekk.

Teir framføra 14. juli kl 20.30 í Runavík, 16. juli kl 20.30 í Syðrugøtu og 17. juli kl 12.00 í Runavík.

Vísusangur:
Niels og Helgi Midjord, ið báðir spæla gittara og syngja fara at framføra egin og norðurlendsk vísuløg.

Teir verða at hoyra 15. juli kl 20.30 á Kirkju, 16. juli kl 22.30 í Syðrugøtu og 19. juli í Mykinesi.

Kingosálmur:
Niels Midjord, Petur Jacob Eliasen og Símun Rasmussen fara at syngja kingosálmar á matiné í Havnar Kirkju. Við sama høvi fer Kristian Blak at framføra egnan tónleik á nýggja klaverið í kirkjuni. Hetta verður 17. juli kl 11.30 í Havnar Kirkju.

Barnatiltak:
Í Syðrugøtu verður barnatiltak við barnasangum og øðrum, við Spælimonnum, Sharon Weiss og Kára Sverrisyni. Barnatiltakið verður kl 15.15 á spæliplássinum í Syðrugøtu.

eys

Miðbýurin veksur

Mikudagin í farnu viku byrjaði útfyllingin við Sandin í sambandi við miðbýarætlanina hjá Klaksvíkar kommunu. Talan er um eitt rættuliga stórt øki, sum skal fyllast út. Eisini aðrastaðni verður arbeitt við at fylla út, so staðfestast kann bara, at býurin er við at vaksa nakað í vavi

ÚTFYLLING
Solby A. Eliasen
solby@sosialurin.fo

Mikudagin í farnu viku byrjaði útfyllingararbeiðið við Sandin í Klaksvík. Arbeiðið fer fyrst og fremst at halda fram hesa vikuna, men so verður feria í triggjar vikur

Klaksvík: Arbeiðið við at fylla út við Sandin gongur skjótt. Tað byrjaði mikudagin í farnu viku, og beinanvegin sást fyrsta broytingin.

Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri, sigur, at útfyllingararbeiðið fer at halda fram hesa vikuna afturat, men so fer Norðoyatunnilin í feriu í triggjar vikur, og tá kemur onki grót.

– Tað kemur sostatt ein steðgur í arbeiðið nú, men vit vænta, at einir 7.000 rúmmetrar verða fyltir út afturat, áðrenn farið verður í feriu, sigur borgarstjórin.

Arbeiðið byrjar so aftur aftan á ólavsøku.

Handilsmiðstøðin ikki slept

Hóast røddir hava verið frammi um, at ætlaða handilsmiðstøðin, sum skuldi byggjast har, sum fylt verður, er slept, so sigur borgarstjórin, at tað er ikki heilt rætt.

– Ætlanin er ikki slept heilt. Eg kann bara siga so mikið sum, at tað verður arbeitt við henni enn, sigur Steinbjørn, sum tó ikki vil koma nærri inn á hetta málið í løtuni.

Tað verður fylt út meira enn ætlað vestarumegin. Hetta kemur av, at eitt arbeiðsøki má verða til byggingina av handilsmiðstøðini.

– Tá hon er liðug, verður alt tað tikið uppaftur og nýtt aðrastaðni. Men vit mugu gera tað soleiðis, tí eitt arbeiðsøki verður alneyðugt í sambandi við miðstøðina, greiðir Steinbjørn frá.

Bingjupláss

Tað er ikki bara við Sandin, at tað verður fylt út í hesum døgum. Við Norðborg á vestaru bryggju hevur eisini dúgliga verðið fylt út í seinastuni, og væntar borgarstjórin, at tá tað arbeiðið er liðugt, verður eitt øki upp á millum 4.- og 5.000 fermetrar til bingjur og annað.

– Vit hava eisini givið út tvey byggiloyvi har, men tey koma at byggja heilt niðan móti bakkanum, so har verður munandi betur pláss, tá arbeiðið er liðugt, sigur Steinbjørn Jacobsen.

Longi hevur verið trongligt á vestaru bryggju í Klaksvík, men um ikki so langa tíð, verður nýggja bingjuplássið klárt at taka í nýtslu.

Steinbjørn sigur at enda, at við vilja verður ikki fylt so langt út á vánna, so at ein møguligur kaikantur kann gerast har, um tað verður neyðugt.

Friðarlig vestanstevna

Løgreglan í Vágunum hevði ikki nógv at gera um vestanstevnuna. Vakthavandi sigur, at tað var stak friðarligt alla stevnuna, og fólk sýndu fyrimyndarligan atburð.

Nógv fólk vóru bæði til kappróðurin og í býnum um kvøldið, men hóast tað var onki hjá løgregluni at gera.

– Ein fullur maður varð tikin inn á støðina at sova rúsin av sær, tað var í stórum tað heila, sigur vakthavandi.

Løgreglan í høvuðsstaðnum, Klaksvík og Runavík sigur somuleiðis frá einum sera, sera friðarligum vikuskifti.

- sae -

Skøvur í dulvitinum

Listakvinnan Ásla Rannvá Svensson er farin á rannsóknarferð í dulvitinum. Við strikum, litum og hvøssum amboðum skavar hon seg heilt ítøkiliga niður undir yvirflatuna á bæði løriftinum og menniskjasinninum

Anna V. Ellingsgaard
anna@sosialurin.fo

Teir 36 málningarnir hjá listakvinnuni Ásla Rannvá Svensson í Norðoya Kunningarstovu hava eittans heiti: Innaralandslag. Skrivað í einum orði í eintal. Ásla er farin á kanningarferð í dulvitinum og gravingaramboðini eru lørift, litir og eitthvørt at skava við. Hetta er eisni tað einasta ítøkiliga áskoðarin hevur at halda seg til. Restin er upp til hugflogið.

Sker inn á bein

Ásla nýtir ikki siðbundnu tilgongdina til sína kanningarferð, har ímyndir og løgnar verur lata dyrnar upp fyri eini endaleysari røð av tulkingum og yvirtulkingum, sum av somu orsøk missa sítt virði og bara standa eftir og síggja tápuligar út.

Ásla hevur kutað alt slíkt burtur, skorið inn á bein við næstan áleypandi harðligum strikum og køldum litum. Myndirnar fáa eitthvørt nakið og verjuleyst yvir seg, men samstundis ófrávíkiligt – sum kann tað ikki vera øðrvísi.

Lindir og leitan

Tá tú velur onki myndevni at hava yvirhøvur, er tað ikki heilt burturvið at lata leitanina eftir myndevninum verða myndevni sjálvt.

Eins og Ásla hevur valt at skriva Innaralandslag í einum orði, sum vóru orðini løgd omaná hvørt annað, eru málningarnir eisini mest at líkna við jarðartvørskurðir har lindirnar skapa sítt egna mynstur.

Hetta er eitt hugskot vit hava sæð fyrr í føroyskum. Seinast í skaldsøgum hjá Marjuni Kjelnæs, sum jú eisini hevur undirheiti "Leitan og lindir" í tilsipingini til eina ítøkiliga og abstrakta undirgrund.

Eins og Ásla hevur valt at skriva Innaralandslag í einum orðið, sum vóru orðini løgd omaná hvørt annað, eru málningarnir eisini mest at líkna við jarðartvørskurðir har lindirnar skapa sítt egna mynstur

Oyðimarkargongd

Við somu litum í ymsum brigdum, somu strikum í ymsum brigdum leitar listakvinnan víðari í dulvitinum, sum sóknast hon eftir meira. Tá møguleikarnir tykjast at vera troyttir, koma skøvur í myndirnar. Fyrst varisliga leitandi síðani agressivar næstan oyðileggjandi. Tað er sum listakvinnan heilt ítøkiliga roynir at skava seg longur og longur niður á dulvitið. Í skøvunum koma nýggj litbrigdi fram og onkustaðni hómast smá frávik frá teimum beinu, vannrøttu rípunum, men so hendir heldur ikki meir. Leitanin verður ein oyðimarkargongd og heldur sum frá líður uppat at vera áhugaverd.

Men Ásla handfer teknikkin á ein sera sannførandi hátt, ikki minst í mátanum boðskapur, teknikkur og tilfar verða endurspeglingar av hvørjum øðrum.